## Bush dumpar

Bush fær dumpikarakter fyri ferð sína í Miðeystri. Hóast ætlanin kanska var góð, so eru úrslitini einki at reypa av, eru amerikonsku miðlarnir samdir um. Í síðstu tíðini sum presidentur hevur Bush átikið sær at fáa frið í miðeystri, og hann tvíhelt uppá, at tað fór at vera møguligt at fáa frið í miðeystri innan januar 2009. Men miðlarnir døma Bush at vera ov hálvhjartaðan og alt ov seinan á veg við síni friðarætlan í miðeystri.



## Skrifta á DR 2

Nú verður tað gjørligt at skrifta í sjónvarpinum. 27. januar sendir DR 2 fyrsta part av eini sendirøð, kallað »skriftstólurin«, har fólk anonymt sleppa at tosa við prestin Preben Kok. Hann vil so, út frá kristnu trúnni, geva teimum vegleiðing at koma úr kreppuni, tey eru í. Hetta er eitt konsept, sum DR sjálvt hevur gjørt, og sum ikki finst aðrastaðni í heiminum. – Vit vilja geva fólki innlit í hvat trúgvin kann gera, sigur eitt umboð frá DR við Kristeligt Dagblad.

# Spara tíð og pengar

**Skálafjarðatunnilin verður mett sum ein hin besta íløgan samfelagsliga, og hann fer at merkja sparing, bæði í tíð og pengum fyri fólk, ið ferðast millum Skálafjørðin og høvuðsstaðarøkið, sigur Dávur Reinert Hansen**



*Dávur Reinert Hansen er stjóri fyri Skálafjarðartunnilin*

SAMFERÐSLA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- At Skálafjarðatunnilin er ein góð samfelagsíløga tykist breið semja um. Men tað hevur samstundis stóran fíggjarligan týdning, at tunnilin kemur sum skjótast.

Tað sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í Pf. Skálafjarðartunnilin.

Hann vísir á, at tann, sum koyrir av Skálafjørðinum ella norðara og eystara partinum av Føroyum til Havnar, vil við Skálafjarðatunlinum spara 80 kilometrar í koyring og ein tíma í tíð hvønn túrin aftur og fram. Tey, ið koyra millum báðar armarnar av Skálafjørðinum spara eisini kilometrar og tíð.

Talan er um eina sparing, sum hevur stóran týdning fyri dagligu viðurskiftini hjá teimum, i ferðast hendan teinin.

- Hetta merkir eina veruliga sparing í krónum og oyrum, eins og hetta gevur meira tíð til familjuna, starvið og virksemi annars, sigur Dávur Reinert Hansen.

At hetta er ein effektivisering av samfelagnum og hevur týdning fyri kappingarførið hjá landinum í síni heild, tykjast politikarar og serfrøðingar samdir um.

Samlaða sparingin við Skálafjarðartunlinum vil, fyri tey sum koyra í dag, vera 130 milliónir krónur um árið, roknað út frá kmkostnaði og tímakostnaði.

Tí hevur tað stóran týdning fyri privatfólk, virkir og landið sum heild, at Skálafjarðartunnilin kemur skjótast til ber.

### Klárt at byrja

Partafelagið Skálafjarðartunnilin varð stovnað í februar 2006 og fór beinanvegin undir at gera forkanningar til at byggja og reka beinleiðis samband millum Skálafjørðin og Tórshavn.

Felagið ásannar bráfeingis tørvin á hesum sambandi, og er tí klárt at fara til verka, so skjótt sum neyðuga tilsøgnin kemur frá landsstýrinum.

- Felagið fegnast um stóra áhugan, sum er vístur fyri verkætlanini, bæði í almenninginum og millum politikarar, sigur Dávur Reinert Hansen.

Ført hevur verið fram, at samfelagslig atlit koma í aðru røð, tá eitt privat partafelag fær loyvi at gera tunnilin. Men veruleikin er, at samfelagslig atlit í sera stóran mun eru tikin.

- Við at samráðast við pf. Skálafjarðartunnilin kann vera farið undir arbeiðið at gera tunnilin so skjótt sum gjørligt. Pf. Skálafjarðartunnilin hevur gjørt umfatandi tekniskar, trygdarligar og jarðfrøðisligar kanningar, og kann so skjótt sum linjuføringin er fastløgd av løgtinginum gera útbjóðingartilfar, so arbeiðstakarar kunnu kappast um at bjóða upp á arbeiðið, sigur Dávur Reinert Hansen.

Um arbeiðið í staðin skal fremjast av almennum ella øðrum partafelag, skal alt gerast av nýggjum. Hetta vil føra við sær, at arbeiðið verður flutt langt út í framtíðina. Sum fleiri politikarar hava víst á, fer politiska skipanin neyvan at raðfesta hesa íløguna í mong ár frameftir, tí aðrar stórar verkætlanir eru tiknar framum.

### Landið fær ágóðan

Samráðingarnar millum Vinnumálaráðið og pf. Skálafjarðartunnilin hava sum endamál at tryggja kapping og gjøgnumskygni. Samráðingarnar hava eisini sum endamál at leggja loft á, hvat avkast partafelagið kann fáa av íløguni, soleiðis at ein vaksandi ferðsla førir til eitt lækkandi nýtslugjald til gagns fyri brúkarar og samfelag.

- Hetta tryggjar, at kostnaðurin av at fíggja, byggja, eiga og reka Skálafjarðartunnilin er grundað á marknaðartreytir, útbjóðing og kapping og verður so lágur sum gjørligt, sigur Dávur Reinert Hansen.

Við at samráðast við pf. Skálafjarðartunnilin fæst tað besta av báðum: Skálafjarðartunnilin kemur so skjótt sum til ber, soleiðis at tey ferðandi kunnu spara 80 km og 1 tíma fyri hvønn túr. Samstundis verður tryggjað, at allur kostnaður av tunlinum byggir á marknaðartreytir, kapping og útboðsprísir og harvið gerst so lágur, sum marknaðurin loyvir.

- Sambært sáttmálanum við løgtingið letur pf. Skálafjarðartunnilin landinum tunnilin eftir 25 árum. Tá fær landið fullan ágóða av tunlinum uttan at hava goldið eina krónu fyri hann, sigur Dávur Reinert Hansen.

# Valplakatir til ampa fyri ferðsluna



*Tað er serliga í rundkoyringunum, at plakatir hava krógva fyri pílunum, men sum sæst á myndini, eru pílaskiltini nú sjónlig*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Løgreglan hevur heitt á býráðið um at taka valplakatir niður, sum eru til ampa fyri ferðsluna**

VAL 08
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið tók vegadeildin hjá Tórshavnar Býráð fleiri plakatir niður, sum vóru til ampa fyri ferðslutrygdina.

Talan var um plakatir, sum krógvaðu ferðsluskilti, serliga í rundkoyringum, men eisini í miðrabattini við SMS.

Vakthavandi á politistøðini sigur, at talan bert var um smávegis trupulleikar, har plakatir tóku útsýnið frá ferðsluskiltum, og at hetta vóru plakatir frá øllum flokkum.

Av vegadeildini hjá Tórshavnar kommunu vátta tey, at tey – eftir áheitan frá løgregluni – tóku fleiri plakatir niður í gjárkvøldið, og at tey ikki av sínum eintingum ganga runt og kanna, um plakatir eru til ampa fyri ferðsluna. Men tá tey fáa áheitan frá løgregluni, taka tey plakatir niður.

Sum nevnt er hetta serliga ein trupulleiki í rundkoyringum, har tær partvís krógva fyri skiltunum, og partvís eru til ampa fyri fótgangarar, verður sagt av vegadeildini hjá Tórshavnar kommunu.